



Avbera gott útsýni við arbeiðsborðið í grovkøkinum



Úr køkinum í stovuni er beinleiðis atgongd út í grovkøkin. Hann er innrættaður í einum fyrrverandi kamari, har alt rokaligt køksarbeiðið nú verður fingið frá hondini

Hugnaligi køkurin er ein gamal snikkarakøkur, sum er málaður hvítur og hevur fingið nýggja borðplátu. Ovaru skápini vóru hillar, men ein snikkari fekk til uppgávu at gera vøkru skápshurðarnar við glasrútum. Eisini síggja vit opið út í grovkøkin, har køliskápið stóð fyrr

Lítla Stella elskar at vera túr við mammu. Allastaðni er hon við, og pinnastill liggur hon í taskuni og eygleiðir umheimin - bæði at keypa inn og á feriu í Spania





Nýtt og gamalt mixað saman í einum horni



Hvíttmálað panelir og pussað trægólv eru í øllum húsinum



Hugnaligt og ljóst úti á baðiverilsinum

Miðhæddin í húsinum var upprunaliga innrættað eins og nógv onnur føroysk hús, við uppihaldsstovu, borðstovu, køki og fleiri smáum kømrum. Sigrun og Regin tóku veggirnar niður millum køkin og stovurnar. Síðani tóku tey køliskápið burtur og gjørdu eitt op afturum til eitt lítið kamar, sum síðani varð umskapað til grovkøk

